# Hvannafelli og Vágfelli til fiskiskap

**Ísfiskatrolararnir Hvannafelli og Vágfelli, sum partafelagið Hvannadalur í Vági eigur, loysa væntandi aftur seinni í hesi vikuni, og djúpvatnstrolarin Beinissvørð er til fiskiskap**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hetta verður fyrsti ísfiskatúrur hjá skipunum, síðan tey vórðu keypt frá Føroya Banka.

Hvannafelli er fyrrverandi Bliki, og Vágfelli er fyrrverandi Nesborg. Bæði skipini eru fyri nøkrum árum síðan keypt heim til Føroya.

Hans Joensen, Hans í Líðini, tey rópa, sigur, at felagið Hvannadalur, sum nú eigur og fer at reka skipini, er stovnað í summar. Felagið hevur fleiri eigarar, serliga í Suðuroy, men eisini norðanfyri Suðuroyarfjørð.



### Keypa fiskidagar

Meðan Hvannafelli hevur ligið við bryggju í Vági tað mesta av hálvum øðrum ári, hevur Vágfelli verið í standby-vinnuni.

- Bæði skipini eru nú klassað og hava fingið neyðugar umvælingar, eins og scan-trol skipanin er sett í tey.

Hans í Líðini sigur, at Hvannafelli og Vágfelli eiga 142 og ein hálvan fiskidag, men hann vónar, at høvi verður at keypa nakrar dagar aftrat.

*- Vit fara at landa veiðina, har mest fæst fyri hana, og vit vóna, at fleiri lastir verða lagdar upp í Suðuroy, sigur Hans í Líðini*



*Vágfelli (mynd) er fyrrverandi Nesborg, sum er smíðað í Gdansk í Póllandi í 1990. Hvannafelli er fyrrverandi Bliki, smíðaður í Svøríki í 1988*

*Mynd: Skipalistin*

- Vit fara at landa veiðina, har mest fæst fyri hana, og vit vóna, at fleiri lastir verða lagdar upp í Suðuroy, sigur Hans í Líðini.

Hann leggur aftrat, at skipini ongar bindingar hava á sær til landing til ávís virki ella økir í landinum.

- Slíkar verkætlanir eru kostnaðarmiklar, og tí ræður sjálvandi um at fáa mest møguligt fyri veiðina - hvønn einasta túr, sigur Hans í Líðini.

### 50 mans

Djúpvatnstrolarin Beinissvørð, sum partvís somu menn eiga og reka, er til fiskiskap.

Aftrat virkseminum hjá Rock Trawldoors, har partvís somu eigarar ganga aftur, gevur samlaða skipa-og lemmavirksemi í Vági arbeiði til einar 50 mans.




# Jan er ikki vónbrotin

**- Eg eri ikki keddur, ei heldur vónbrotin. Skal man ganga fornermaður í einum slíkum starvi, gerst tú ikki gamal sum formaður í Fiskimannafelagnum, sigur Jan Højgaard**

LIMATRÆTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir fýra limirnir í Fiskimannafelagnum, sum fyrr í heyst vórðu burturvístir úr felagnum, hava nú fingið bræv um, at burturvísingin er tikin aftur.

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, sigur, at hann tók avgerðina um at burturvísa monnunum eftir bestu sannføring og í samráð við ein meiriluta í leiðslu felagsins.

Hann sigur, at hann hevði telefonsamskifti við menn í leiðsluni, og tá hann tók avgerðina, var hann í teirri trúgv, at hann hevði ein meiriluta aftanfyri seg.

Hesin meiriluti skuldi tó vísa seg ikki at vera til steðgar, tá samanum kom.

Á fundi í Fiskimannafelagnum í seinastu viku avgjørdi nevndin at annulera burturvísingina og taka menninar innaftur í felagið.

- Eftir nevndarfundin hava vit eina nýggja støðu sum ber við sær, at burturvísingin er tikin aftur, og teir fýra menninir hava nú fingið bræv um, at teir eru limir aftur í felagnum, sigur hann.

### Ikki vónbrotin

Spurdur, hvussu tað kennist at noyðast at boyggja seg í hesum máli, sigur Jan Højgaard:

- Eg eri ikki keddur, ei heldur vónsvikin. Skal man ganga fornermaður í einum slíkum starvi, gerst tú ikki gamal sum formaður í Fiskimannafelagnum, sigur Jan Højgaard.



*Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Menninir, sum vórðu burturvístir og seinni tiknir innaftur í felagið, eru teir, sum á sinni mynstraðu við Carlton í trætuni millum Fiskimannafelagið og felagið í Klaksvík, sum átti skipið.